

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 06 - 2013

# Eftirspurningur eftir orku veksur

Roknað verður við, at eftirspurningurin fer at økjast fyri øll orkusløg tó við stórari spjaðing, frá einum árligum vøkstri á 0,5% fyri olju og til heili 8,9% fyri varandi orku. Hetta merkir, at tann samlaði altjóða eftirspurningurin eftir orku væntast at vaksa við heili 40% fram í móti 2040. Hetta stendur at lesa í frágreiðing, sum norska Statoil hevur almannakunngjørt og kallar Orkuútlit 2040 - búskaparliga gongdin og marknaðarútlit. Nøkur av høvuðspunktunum úr frágreiðingini hjá Statoil, eru almannakunngjørd á heimasíðuni www.statoil.com. Oljan.fo hevur hugt at frágreiðingini, sum m.a. brúka hagtøl frá altjóða orkustovninum IEA sum grundarlag og gjørt samandráttin niðanfyri. Fossilu brennievnini 72,5% Marknaðarparturin fyri varandi orku vil økjast úr 1% upp í heili 8%. Tey fossilu brennievnini, olja, gass og kol, koma tó framvegis at umboða umleið 72,5% av tí samlaðu orkunýtsluni, sum m.a. merkir, at eftirspurningurin eftir olju vil vaksa til uml. 100 milliónir tunnur um dagin (mt/d), ein øking við uml. 15 mt/d frá í dag. Væntandi fer eftirspurningurin eftir olju at náa hæddarpunktið í 2030. Hendan avmarkingin stendst fyrst og fremst av einum høgum prísi, kapping frá øðrum brennievnum, tøkniligum broytingum og effektivisering innan flutningsídnaðin. Nýggj oljusløg gerast lønandi Tøkniliga frambrotið innan skifergass og tann alsamt mennandi oljusandsvinnan, merkir, at fleiri nýggj oljusløg - so sum olja úr tight shale, NGL úr skifergassi og oljusandi,- gerast alsamt meiri lønandi. Náttúrugass Tað nýggja brennievni Samanborið við kol, er náttúrugass bæði lætt atkomuligt, lætt at hava við at gera og umhvørvisvinarligt. Tískil kemur náttúrugass alsamt at spæla ein størri leiklut sum brennievni tey komandi árini. Væntandi fer hesin eftirspurningur tí at vaksa við heili 1,6 % um árið fram til 2040, sum er væl skjótari enn vøksturin í samlaða orku eftirspurninginum. Hetta førir sjálvsagt við sær, at